DAGSINS MEINING

Skilagóðar yvirtøkur

Í gjár hevði landsstýrismaðurin í lógarmálum Høgni Hoydal fund við danska ráðharran sum hevur útlendingamál um hendi. Endamálið við fundinum var at vita, um tað ber til at yvirtaka útlendingaøkið ella partar av tí. Sum skilst hevur tað eydnast landsstýrismanninum at fáa grønt ljós fyri eini slíkari yvirtøku umframt flóttafólkaøkið. Sambart útvarpinum í gjár skal setast ein sokallað skjót mannagongd í verk, tá tað snýr seg um at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi til Føroya. Síðani skal arbeiðsbólkur setast at fyrireika lóggávu, tá tað snýr seg um arbeiðs- og uppihaldsloyvi og spurningin við at umsita, hvørji flóttafólk skulu koma til landið og ikki. Málið skal yvirtakast seinast í hesum árinum.

Hóast tað í tí stóra høpinum er eitt lítið mál, so má tað sigast at verða skilagott, at Landsstýrið er sinnað at yvirtaka eitt nú umsitingina av arbeiðsloyvum fyri útlendingar, ið koma til Føroya.

Man hevur lært av teimum samskiftistrupulleikum, ið hava verið og ikki minst tann tíð, tað hevur tikið, at umsitið slík mál. Alt hevur verið viðgjørt tvær ferðir áðrenn við tað, at Landsstýrið hevur viðgjørt umsóknina fyri síðani at skula sent hana niður til Danmarkar.

Yvirtøkan av einum slíkum máli átti ikki at skapt økta umsiting, tí Landsstýrið avgreiðir eftir øllum at døma øll mál sum er, og neyvan er nakar flokkur, ið ikki heldur vil hava slík arbeiðsloyvi avgreidd í Føroyum. Føroya Landsstýri hevur til eina og hvørja tíð betri føling við tørvinum hjá borgarum og vinnulívi í Føroyum, enn eitt avgreiðslukontór niðri í Danmark.

Vit hava so eisini sæð, hvussu tung og óliðilig skipanin kann vera við arbeiðsloyvum. Her hugsa vit m.a. um oljuleitingina á landgrunninum í fjør. Tá skuldu eftir røttum allar umsóknirnar til Danmarkar at viðgerðast, áðrenn loyvi kundi gevast. Og skuldi tann reglan haldast, so hevði als ikki verið nøkur boring í fjør. Tí fleiri mánaðir ganga at fáa svar úr Danmark. Tí varð einasta leiðin tá at geva undantaksloyvi el. Nettupp hetta er eitt gott dømi um, hvussu skilagott tað er, at viðgerðin av umsóknum um arbeiðsloyvi fer fram heima í Føroyum og onga aðrastaðni.

Hettar átti at verið eitt mál, ið kundi verið yvirtikið í tí stilla, uttan stórvegis hóvasták og staðfestingar. Umsitingin hevur sum skilst vístí verki, at hon er væl før fyri at avgreiða slík mál sum er. Men her er so eitt mál, sum landsstýrið hevur megnað at fáa avgreitt, og er tað neyvan í andsøgn við tann yvirtøkupolitikk, sum eisini partar av andstøðuni standa fyri.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Barnagarð til landssjúkrahúsið!

Aftursvar til Jógvan við Keldu

Annita á Fríðriksmørk
Løgtingskvinna

Jógvan við Keldu løgtingsmaður hevur sett mær nakrar áhugaverdar spurningar, um málið viðvíkjandi barnagarðinum til landssjúkrahúsið.

Spurningarnir, sum vóru 9 í tali, stóðu í bløðunum mikudagin.

Tað, sum hevur týdning í hesum sambandi er at skilja, hví barnagarðurin til landssjúkrahúsið er í serligari støðu, og hví hann eigur at verða viðgjørdur fyri seg, eftir at barnagarðsøkið er lagt út til kommunurnar at røkja.

Barnagarðurin er eitt mál fyri seg, og skal loysast serstakt.

Landsstýrismaðurin arbeiðir við eini prinsipiellari loysn, sum skal verða langsiktað og sum kann nýtast sum fyrimynd, um líknandi tørvur skuldi víst seg aðrastaðni.

Vísir seg tørvur á barnagarðum aðrastaðni, sum eru opnir døgnið runt, er onki til hindurs fyri, at spurningurin aftur verður tikin upp til tað tíð. Reaktiónirnar sum hava verið at sæð og hoyrt ímóti ætlanini hjá samgonguni um at byggja barnagarð til landssjúkrahúsið, hava m.a. gingið út uppá, at *"fær Havnin, so skulu vit eisini hava".*

Slíkt er óseriøsit. Ynskir onkur okkurt, má orsøkin verða onnur enn, ti *"at Havnin fær".* Har má verða fingin til vega ein tørvsmeting, sum lýsir støðuna, og svarar uppá spurningar, sum t.d. um trupulleikin við at fáa læknar og sjúkrasystrar og onnur at søkja størv á staðnum er orsakað av *manglandi barnaansing.*

--

At barnagarðsøkið er lagt út til kommunurnar at røkja er eisini orsøkin til, at landsstýrismaðurin er í samráðingum við Tórshavnar Kommunu (hereftir TK) um eina loysn á hesum máli, við tí fyri eyga, at TK eisini átekur sær sína ábyrgd.

Frá almennari politiskari síðu er rætt at miðja eftir so góðum kørmum sum møguligt, soleiðis, at tænastan á Landssjúkrahúsinum kann verða á einum dygdargóðum støði fyri alt *Føroya fólk.* Men so harfrá og at krevja, at TK skal átaka 100 % ábyrgd av einum barnagarði, sum vit politiskt ynskja skal verða opin 24 tímar um døgnið, kann ikki verða rætt.

Kjak um peningarenslið millum valdømini

Jógvan við Keldu vísir á munin millum skattainntøkur og almenn/privat størv í ávíkavist TK og øðrum kommunum, og setir soleiðis hesar upp ímóti hvørjum øðrum. Vit eiga hinvegin at minnast til, at hvør av øðrum liva má. Og soleiðis er tað óansæð, *hvør* tú ert, ella *hvaðani* tú ert, ella hvørja kommuna talan er um. Og soleiðis er tað eisini óansæð um einum dámar betur almenn størv ella privat. Í einum samfelagið sum okkara er alneyðugt við øllum góðum kreftum, almennum sum privatum, óansæð um hesar búleikast í Havnini ella aðrastaðni í landinum.

Og so kann eg leggja tað afturat, at hóast spurt verður um munin millum Havnina og onnur øki, og um sambandið teirra millum, so verður neyvan í nøkrum blaðgreinum møguligt at geva eina sakliga lýsing, hvørki av peningarenslinum millum valdømini, ei heldur av støðuni í hvørjum valdømi sær.

Lat okkum heldur síggja samfelagið út frá tí sjónarvinkli, at hóast ósemjur og stríð, so liva øll øki í landinum av hvørjum øðrum og hava gagn av hvørjum øðrum; og allir tættir á arbeiðsmarknaðinum liva somuleiðis av hvørjum øðrum og hava gagn av hvørjum øðrum. Soleiðis eru spælireglurnar í okkara lítla men fjølbroytta samfelag.

Latum okkum so at enda standa saman og stuðlað landsstýrismanninum hjá okkum í hesum máli. Hann roynir hóast alt at fáa eina skilagóða og langsiktaða loysn á málinum. Hann er farin til verka og dregur hvørki valdømisstrið ella partapolitikk inn í málið!

Nú manglaði barnagarðurin á LS

Jónfinn Olsen
Form. í UfM

Tað hoyrist nú, at tað skal verða møguleiki at útbúgva kommunulæknar í Føroyum. Í fylgið ÚF aftrar onkur seg við at søkja, sum møguliga hevur áhuga at koma henda vegin, tí møguleiki er ikki fyri at fáa børnini ansaði.

Í stevnuskrá Miðfloksins undir heilsumál stk. 1, stendur soleiðis: »Øllum borgarum landsins eigur tilboð um góða heilsu- og sjúkrarøkt at standa í boði«. Men útbyggja vit ikki økið, og fáa støðuga tilgongd av útbúnum fólkið til hetta økið, eisini við víðari útbúgving fyri eyga, so kann tað verða skjótt, at onki tilboð á hesum økið er til borgaran í Føroyum.

Men Miðflokkurin vil arbeiða fyri at góð heilsu- og sjúkrarøktar tilboð standa borgarum okkara í boði við væl útbúnum fólkið, um tú gevur honum møguleika til tess.

Sigast kann at ein barnagarður til Landssjúkrahúsið hevði bøtt munandi um hetta. Tí er tað av so stórum týdningi, at íloga verður játtað til henda barnagarð.

Miðflokkurin tín rødd á løgtingið.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggdagad klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggdagadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Hví smílist Anders Fogh?

Marjus Dam
løgtingsmaður

Sjálvandi má hann smílast. Loysingarleiðarnir Annfinn Kallsberg og Høgni Hoydal geva honum 400 milliónir hvørt einasta ár. Og sleppa tey framat eftir valið, veksur peninganøgdin til 1,6 milliard krónur árliga. Ella 6,4 milliardir í einum valskeiði.

Fyri hesa stóru upphædd kann mangt gerast í Danmark. Og um hendan upphædd ikki er tilstaðar, so er tað mangt, ið ikki kann gerast í Føroyum.

Hvat hendir tá?

Hvat fer at henda, tá hendan risaupphædd er burtur hoyrir ongin nakað um. Pressan, ið javnan spyr Høgna og Anfinn Kallsberg mangt og hvat, setir ongantíð hendan spurning. Hvat hendir? Hvar skal skerjast? Tí tað er púra greitt, at tá minni peningur er tøkur, so skal sparast og skerjast.

Hetta er mest relevanti spurningur fyri vanliga føroyingin. Men bæði løgmaður oga varaløgmaður svara ikki ella ósatt um hesi viðurskiftir. Løgmaður hevur fleiri ferðir nevnt um "varisliga og trygga tilgongd". Men ongin hevur enn sæð nakað roknistykki um hesi viðurskiftir - sjálvt um vit hava spurt, hvussu t.d skarnsgerðin(at skerja blokkin 400 milliónir) fer at ávirka t.d. ílogur, ið skulu gerast.

Fullveldið lumpar lesandi:

Mogens Lykketoft hevði eitt roknistykki. Tað svaraði til 1,6 milliardir fyri at loysa árliga. Høgni Hoydal heldur fram at tosa. Hann tosar um útbúgvingarstuðul "hægri enn tann danska". Hví ikki siga sum er, at tá ríkisveitingin er burtur verður útbúgvingarstuðulin helst á íslendskum støði, nevniliga 0 kr. Tað hevði verið meira realistiskt. Vit kunnu nú hava ein rímiligan útbúgvingarstuðul í Føroyum, av tí at vit eru í Ríkisfelagsskapinum.

Fullveldið lumpar pensionistin:

Hví ikki siga við føroyskar pensionistar, at pensiónin sum nú er hækka, tí vit enn eru í ríkisfelagsskapinum, fer at lækka munandi í fullveldinum - um tað yvirhøvur verður ráð at hava nakra pensión. Tað er lætt at tosa loysing og vera í ríkisfelagsskapinum. Men dagligi dagurin í fullveldinum verður ikki tespiligur. Tí ongin peningur verur tøkur í mun til ídag.

Fullveldið er í andsøgn til vælferðarsamfelagið:

Hví ikki greiða fólki frá, at lønin fer at lækka, arbeiðsloysi at vaksa. Hví ikki greiða frá, at vælferðarsamfelagið er ósannbarligt við eitt fullveldi. Hví látast sum um øll figgjarviðurskiftir batna, tá minni peningur er tøkur. Tað er jú í andsøgn við allan veruleika - uttan sjálvandi fullveldi - hvørs grundarstøði er lygn.

Hvat við eitt sindur av saklígheit.

Fullveldið er eitt land, ið byggir á luftkastellir og í stóran mun á ósannindir.

Og hvør fær rokningina? Jú, sjálvandi tann sum higartil bert hevur fingið vaksandi rokningar frá loysingar landstýrinum.

Áhugavert hevði verið at sæð avleiðingarnar av fullveldisrokningini. Hvussu við langtíðarætlanum, sparingum og skerjingum? Hvussu nógvir túsund føroyingar fara at flyta av landi? Hvussu stórt verður arbeiðsloysi og hvussu langt niður skal tímalønin lækka?.Varisliga mett.

Anfinn Kallsberg & Høgni Hoydal.

Lati føroyingar sleppa at síggja rokningina fyri loysingina áðrenn loyst verður - takk.

Føroyar í Ríkisfelagsskapi hava eina figgjarætlan at vísa, ið vit kunnu vera errin av - hóast tit hava skatt figgjarætlanina sera nógv við at geva 400 milliónir burtur.

Tit eru glaðir, tí Fogh smílist.

Men tit skulu vita, at sera nógvir føroyingar halda tykkum hava gjørt eina dáragerð fyri Føroyar. Og vit smílast ikki - men bert ógvast og stúra fyri avleiðingunum av tykkara luftkastellum.

Tit skaða móðurland mítt Føroyar.

Ótokk fyri ta skarnsgerð.

Sámal Petur í Grund ger mismun á almennum starvsfólkum kring landið

Eyðgunn Samuelsen
formaður í sosialu nevnd Klaksvíkar Býráð

Nú um dagarnar hoyrist í fjølmiðlunum, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum vil leggja uppskot á ting um, at ein barnaansingarstovnur til starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum skal figgjast á løgtingsins figgjarlóg.

Barnaansing er, sum øllum kunnugt, eitt kommunalt málsøki, so hetta ørkymlar at hoyra, at landið nú skal figgja kommunalar uppgávur. Hvar fór tað greiða uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunu?

Tað sum ørkymlar enn meira er, at nú ger landsstýrismaðurin mismun á starvsfólki innan heilsuøkið. Hvat við ansingartrupulleikanum hjá somu starvsfólkum á Suðuroyar- og Klaksvíkar Sjúkrahúsið? Eg kenni ikki trupulleikarnar í Suðuroy, men kenni teir væl á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Í Klaksvík er bíðilistin á 150 børnum. Sjálvt um kommunan ger alt, ið hon er ment, at minnka um henda, er hann enn alt ov stórur. Vit hava sett okkum sum mál at fáa bíðirøðina vekk í hesum valskeiðnum, men tað er ein onnur søga.

Starvsfólkið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hevur trupulleikar við at fáa ansingarpláss, eins og nógv onnur foreldur. Men tey hava eisini ein annan trupulleika, og tað er, at tey hava brúk fyri einum stovnið, ið er opin alt samdøgrið, tí tey hava skeiva arbeiðstíð. Um landsstýrismaðurin ikki veit tað, so kunnu vit upplýsa hann um, at trupulleikin við at fáa læknar er enn meira akuttur í Klaksvík og Suðuroy, enn í Havn. Væntandi barnaansing ger ikki støðuna betur, heldur ikki í útjaðaranum.

Skal hetta, ið landsstýrismaðurin nú ætlar, ikki bert vera vanligt valagn, so má hann loysa trupulleikan fyri alt starvsfólkið innan heilsuverkið og ikki bert í einum valdømi.

Eitt ár í býráðnum (7)

Valgreinir um framtíðina

Jógvan Arge

Í einari valgrein til býráðsvalið 2000 varð tikið soleiðis til um hjartamálini: "Ongantíð er meiri aktuelt enn nú at gera sær hugsanir og leggja ætlanir um framtíðina hjá okkara høvuðsstaði".

Hetta er staðfest upp aftur meir síðani. Tí havi eg av heilum huga tikið undir við at gjørd verður ein heildarætlan fyri útbygging av Tórshavnar Kommunu. Arbeiðið er setið í verk. Eitt ráðgevarafelag stendur fyri tí saman við umboðum fyri kommununa.

Ætlanirnar skula verða lidnar um eitt ár. Tá hava vit vónandi eitt gott og spennandi boð uppá, hvussu Havnin skal útbyggjast sum býur og høvuðsstaður tey fyrstu 20-25 árini. Hvar bústaðarøkini verða, hvar vinnuøkini verða, hvar handilsøkini verða, hvar stovnarnir verða og hvar rekreasjónsøkini verða.

Hetta er óivað eitt torført putlispæli, tí hóast kommunan er stór í vavi, so er ikki alt lendi eins væl egnað til alla nýtslu, og nakað nógv av góðum byggilendi er longu brúkt.

Kommunan og oljan

Í summar varð uppskot lagt fyri býráðið um eina oljuráðleggingarnevnd fyri Tórshavnar Kommunu.

Ætlaði at býráðið skuldi seta fólk at meta um, hvat árin tað fær á Tórshavnar Kommunu og okkum, sum her búgva, um oljuvinna av álvara tekur seg upp undir Føroyum.

Málið fekk ringa móttøku. Borgarstjórin kallaði tað eitt politiskt flopp og fekk sítt egna uppskot samtykt, sum segði, at embætisfólk í kommununi skula savna saman teir leysu endarnar um oljuvinnu, sum liggja á ymsum skrivstovum hjá býráðnum.

So frægt var kortini, at evstamark varð sett. Frágreiðing skal leggjast fram í summar. Tá verður so høvi at taka aftur í aftur hetta málið, sum kanska fer at vísa seg at hava nógv størri týdning, enn borgarstjórin í Havn dugdi at ímynda sær.

Øðrvísi íbúðarbygging

"…og tí er neyðugt at fáa gongd á aðrar íbúðarformar. Gongdin tann vegin hevur verið at hóma leingi", varð skrivað í sambandi við húsaneyðina í Havn.

Tórshavnar Býráð hevur nú verið við til at stovna ein sjálvsognarstovn, sum hevur til endamáls at byggja lutaíbúðir á Berjabrekku. Lutaíbúðir eru sera nógv frammi í eitt nú Danmark, har figgingarstovnarnir í fyrstu framtíð væntast at fara at detta um beinini á hvør øðrum at sleppa at figgja slíkar íbúðir.

Men lóggávan í Føroyum gevur ikki slíkum ætlanum tær røttu sømdirnar. Tað er spell, tí slík bygging er eisini ætlað teimum, sum ikki eru før fyri ella ikki leggja í at seta seg fyri vanligum sethúsum. Vanliga eigur hon heldur ikki part í Hon eigur heldur ikki part í spekulasjón.

Best hevði verið, um eftirlonargrunnar ella onnur við pengum komu upp í ætlanir av slíkum slag, men tey tykjast halda seg aftur. Tí tykir mær, at tað nú er ein spurningur, um kommunan ikki noyðist at seta nakað meir í projektið á Berjabrekku 3 til tess at fáa gongd á

Havi skilt, at Berjabrekka 3 skal keypa grundstykkið, sum byggjast skal á, frá kommununi fyri útivið fimm mió kr. Til tess at komið eitt stig longur fram ímóti teirri øðrvísi íbúðarbyggingina kundi kommunan, um hon meinar nakað sum helst við sína vælvild, skotið grundstykkið inn í ætlanina.

Eintáttað bygging

"Sjálvandi skal kommunan, so væl, sum hon kann, útvega nýggj grundstykkir til sethús", varð sagt í somu grein. Gongd er allatíðina í slíkum ætlanum, og tí er nógv ferð á húsabyggingini í Havn í dag.

Hesi hús seta sín dám á umhvørvið og verða ein partur av Havnar býi í mong, mong ár. Tí er umráðandi, at skil er í byggingini. Húsini skula bæði vera góð at búgva í og hava gott árin á kringumhvørvið og býarmyndina.

Partar av tí nýggjastu húsabyggingini í Havn kundu verið betur. Einstaklingahúsini eru vanliga áhugaverd og prýði fyri umhvørvið, men orsøk er til at finnast at raðbyggingunum.

Mær tykir, at vit longu hava fingið heldur nógvar av hesum longu sperðlunum, sum eru so einátteðar og keðiligir, at tú onkrar løtur kennir teg staddan eystanfyri jarntjaldið.

Her hevur byggideildin hjá kommununi eina týðandi uppgávu saman við byggi- og býarskipanarnevndini. Meir enn so verður talað at, men tað verður kanska ikki gjørt nóg ofta og nóg fast.

Eg haldi ikki, at tað nýtist at vera ein meginregla, at lítið hugflog skal vera í eini húsabygging fyri at hon skal vera yvirkomilig figgjarliga.

Býurin og børnini

"Allir partar verða vinnarar, um trupulleikarnir at ansa børnum verða loystir", varð sagt um barnaansingarmálini, sum vóru einafremst í kjakinum til býráðsvalið.

Havi viðgjørt hesi málini í mentamálanevndini. Ongin ivi er um, at hugburðurin er at nøkta tørvin, so skjótt sum til ber, og tí verður fyrsta dagin farið undir at byggja tveir stovnar aftrat.

Hevði samgongan ikki havt loynda dagsskrá í hesum byggingarmáli, høvdu stovnarnir báðir longu verið komnir væl áleiðis, men nú verða teir valla lidnir fyrrenn árið fer at halla. Útlit eru til, at fleiri dagstovnar verða settir í ordra nakað skjótt.

Serfrøðingar hava í seinastuni viljað verið við, at fløskuhálsar á hesum økinum og íbúðarøkinum darva teirri menning, sum annars hevur tikið seg upp í landinum.